

## Owen spælir aftur í ár

Michael Owen sigur nú, at hann roknar við at vera á vøllinum aftur, áðrenn kappingarárið er av. Owen noyddist annars av vøllinum við krossbandsskaða, tá Ongland spældi móti Svøríki í HM-kappingini í summar, og síðani hevur hann stríðst fyri at vinna førleikan aftur. – Enn er nógv arbeiði eftir at gera, men eg síggi framgongdina, og eg gleði meg til tann dagin, tá eg aftur kann spæla í Premier League. Og tann dagurin kemur vónandi, áðrenn hetta kappingarárið er av, sigur Owen.

## Drogba verður toppskjútti

Tað er eingin ivi, um ivorianski áleyparin hjá Chelsea sjálvur skal svara. – Eg verði besti málskjúttin í Premier League í ár. Fólk halda kanska, at eg spæli væl, men eg verði nógv betri. Eg havi ongan tíð verið so væl fyri í lívinum, og tí ætli eg mær ikki at lata møguleikarnar fara framvið, sigur Drogba, sum hevur tvey mál fyri árið. Gylta skógvin til sín og meistaraheitið til Chelsea. Drogba varð í fjør keyptur fyri £24 mió, men fram til í ár hevur hann havt trupult við at finna meskarnar. Higartil hevur hann tó skotið átta mál hetta kappingarárið.

# Teir ríkastu móti teimum veikastu

**Mulitmillióningarnir úr Chelsea skulu í fyrsta umfari av FA-Cup spæla móti vánanligasta liðnum í ensku ligunum. Lutakastið gav eisini fleiri áhugaverdar uppgerðir millum Premier League feløg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enska steypakappingin – FA-Cup – er kanska mest siðbundna steypakappingin yvirhøvur. Somikið siðbundin, at hon enn ikki hevur mist allan status, hóast Champions League milliónirnar eru tær, sum seta dagsskránna flestu staðni í europiska fótbóltsheiminum.

### Fýra PL-uppgerðir

Spenningurin undan triða umfarinum er eisini stórur, tá lutakastið stendur á skránni. Hetta er umfarið, tá feløgini úr sterkastu deildini koma upp í kappingina, og altíð er tað fyrsta vikuskiftið eftir nýggjársdag, sum er karmurin.

Lutakastið til umfarið var í gjár, og her standa fleiri áhugaverdar uppgerðir á skránni. Ikki færri enn fýra dystir eru reinar Premier-League uppgerðir, harav tann millum Liverpool og Arsenal man vera tann, sum mest líkist einum sonnum braki. Men talan verður helst eisini um spennandi dystir, tá Manchester United tekur móti Aston Villa. Tá nýríka Portsmouth taka ímóti væl koyrandi Wigan. Og tá Everton og Blackburn leita sær eftir skjóta vegnum til Europa.

### Pinkulingar móti risum

Og so er FA-Cup eisini kappingin, har tey lítlu veruliga sleppa at royna seg. Ofta vinna smærru feløgini sær heiti sum Giant Killers, tá tey hava sent okkurt felag úr fremstu deildini út, men tað er tó neyvan tað, sum Macclesfield skal droyma um.

Macclesfield er í løtuni væl og virðiliga vánaligasta liðið í ensku liga-skipanini. Teir hava sjey stig eftir fyrstu 19 dystirnar í League Two, og tá hugsað verður um mótstøðuna, so er helst ikki tað stóra at gera. Macclesfield skal nevnliga á vitjan á Stamford Bridge, har tvífaldu meistararnir úr Chelsea taka ímóti.

Longu undan Abramovich-tíðini vildi talan verið um sera stóran bita fyri lítla felagið, men við milliardunum, sum síðani er skolaðar yvir Stamford Bridge, er ilt at síggja, hvussu Macclesfield skal sleppa bara so nøkun lunda livandi frá uppgerðini.

Men tað er tó púra víst, at teir vilja selja seg dýrt. FA-Cup kappingin inniheldur hópin av dømum um, tá tey lítlu vunnu á teimum stóru. Tá tey fátæku vunnu á teimum ríku. Og tí fer Macclesfield at spæla sín møguleika, sum teir helst bara fáa tann eina av í lívinum. Men júst hetta er eisini tað, sum ger FA-Cup'in serligan.




*Roman Abramovich klappar. Tað gera tey helst eisini í Macclesfield. Tí hóast lítla felagið neyvan ger sær vónir um at koma víðari, tá teir vitja á Stamford Bridge, so er talan um ein av teimum møguleikum, sum kanska bert koma eina ferð í lívinum*

*Mynd: Scanpix*

## FAKTA UM FA-CUP

**Dystirnir í 3. umfari**
**6. januar**

Barnet-Colchester
Birmingham-Newcastle
Blackpool-Aldershot/Basingstoke
Bristol City-Coventry
Bristol R./Bournem.-Hereford
Bury/Chester-Ipswich
Cardiff-Tottenham
Chelsea-Macclesfield
Crystal P.-Swindon
Derby-Wrexham
**Everton-Blackburn**
Hull-Middlesbrough
Leicester-Fulham
**Liverpool-Arsenal**
**Man Utd.-Aston Villa**
Mansfield/Doncaster-Bolton
Peterborough-Plymouth
**Portsmouth-Wigan**
Preston-Sunderland
QPR-Luton
Reading-Burnley
Salisbury/Notttingh. F.-Charlton
Sheffield Utd.-Swansea
Sheffield W.-Man City
Southend-Barnsley
Stoke-Bradford/Millwall
Tamworth-Norwich
Torquay/Leyton O.-Southampton
Watford-Stockport
WBA-Leeds
West Ham-Brighton
Wolverhampton-Oldham

**Hondbóltsstøður**
**Sunset-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 123 | 97 | 26 | 8 |
| 2 VB | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 141 | 139 | 2 | 8 |
| 3 Neistin | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 123 | 103 | 20 | 7 |
| 4 StÍF | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 152 | 185 | -33 | 3 |
| 5 Kyndil | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 108 | 123 | -15 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 237 | 220 | 17 | 13 |
| 2 StÍF | 8 | 4 | - | 3 | - | 1 | 227 | 216 | 11 | 11 |
| 3 Neistin | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 263 | 236 | 27 | 10 |
| 4 KÍF | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 185 | 193 | -8 | 5 |
| 5 Kyndil | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 196 | 205 | -9 | 4 |
| 6 H71 | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 207 | 245 | -38 | 3 |

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 10 | 7 | - | 3 | 25 | 18 | 7 | 14 |
| 2 Dráttur | 10 | 7 | - | 3 | 24 | 18 | 6 | 14 |
| 3 TB | 10 | 6 | - | 4 | 22 | 13 | 9 | 12 |
| 4 SÍ | 10 | 6 | - | 4 | 22 | 17 | 5 | 12 |
| 5 KÍF | 10 | 2 | - | 8 | 16 | 24 | -8 | 4 |
| 6 Mjølnir | 10 | 2 | - | 8 | 8 | 27 | -19 | 4 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 8 | 6 | - | 2 | 21 | 12 | 9 | 12 |
| 2 ÍF | 6 | 5 | - | 1 | 15 | 10 | 5 | 10 |
| 3 Fram | 7 | 4 | - | 3 | 14 | 14 | 0 | 8 |
| 4 Fleyr | 7 | 2 | - | 5 | 12 | 17 | -5 | 4 |
| 5 SÍ | 8 | 1 | - | 7 | 14 | 23 | -9 | 2 |

**Enska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd. | 16 | 13 | - | 2 | - | 1 | 35 | 8 | 27 | 41 |
| 2 Chelsea | 15 | 11 | - | 2 | - | 2 | 25 | 8 | 17 | 35 |
| 3 Arsenal | 15 | 7 | - | 4 | - | 4 | 25 | 12 | 13 | 25 |
| 4 Portsmouth | 16 | 7 | - | 4 | - | 5 | 21 | 14 | 7 | 25 |
| 5 Liverpool | 16 | 7 | - | 4 | - | 5 | 19 | 15 | 4 | 25 |
| 6 Reading | 15 | 8 | - | 1 | - | 6 | 17 | 18 | -1 | 25 |
| 7 Everton | 16 | 6 | - | 6 | - | 4 | 20 | 15 | 5 | 24 |
| 8 Aston Villa | 16 | 5 | - | 9 | - | 2 | 19 | 15 | 4 | 24 |
| 9 Bolton | 16 | 7 | - | 3 | - | 6 | 15 | 15 | 0 | 24 |
| 10 Fulham | 16 | 5 | - | 5 | - | 6 | 16 | 23 | -7 | 20 |
| 11 Man City | 15 | 5 | - | 4 | - | 6 | 13 | 17 | -4 | 19 |
| 12 Tottenham | 15 | 5 | - | 4 | - | 6 | 13 | 19 | -6 | 19 |
| 13 Wigan | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 17 | 20 | -3 | 18 |
| 14 Blackburn | 14 | 4 | - | 4 | - | 6 | 13 | 17 | -4 | 16 |
| 15 Middlesbr. | 15 | 4 | - | 4 | - | 7 | 12 | 19 | -7 | 16 |
| 16 Sheffield Utd. | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 11 | 20 | -9 | 16 |
| 17 West Ham | 15 | 4 | - | 2 | - | 9 | 10 | 18 | -8 | 14 |
| 18 Newcastle | 14 | 3 | - | 4 | - | 7 | 9 | 15 | -6 | 13 |
| 19 Watford | 14 | 1 | - | 6 | - | 7 | 10 | 20 | -10 | 9 |
| 20 Charlton | 15 | 2 | - | 3 | - | 10 | 11 | 23 | -12 | 9 |

**Enska League One**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Nottm Forest | 19 | 12 | - | 5 | - | 2 | 26 | 12 | 14 | 41 |
| 2 Scunthorpe | 19 | 10 | - | 5 | - | 4 | 29 | 14 | 15 | 35 |
| 3 Tranmere | 19 | 10 | - | 4 | - | 5 | 23 | 13 | 10 | 34 |
| 4 Bristol City | 19 | 10 | - | 3 | - | 6 | 25 | 18 | 7 | 33 |
| 5 Oldham | 19 | 9 | - | 5 | - | 5 | 28 | 16 | 12 | 32 |
| 6 Swansea | 19 | 9 | - | 4 | - | 6 | 26 | 20 | 6 | 31 |
| 7 Yeovil | 20 | 8 | - | 7 | - | 5 | 23 | 19 | 4 | 31 |
| 8 Carlisle | 19 | 8 | - | 6 | - | 5 | 23 | 20 | 3 | 30 |
| 9 Crewe | 19 | 8 | - | 3 | - | 8 | 36 | 33 | 3 | 27 |
| 10 Gillingham | 19 | 8 | - | 3 | - | 8 | 29 | 32 | -3 | 27 |
| 11 **Blackpool** | 19 | 6 | - | 7 | - | 6 | 26 | 21 | 5 | 25 |
| 12 Doncaster | 19 | 5 | - | 9 | - | 5 | 17 | 17 | 0 | 24 |
| 13 Brighton | 19 | 7 | - | 3 | - | 9 | 24 | 28 | -4 | 24 |
| 14 Hudddersfield | 19 | 6 | - | 6 | - | 7 | 25 | 30 | -5 | 24 |
| 15 Bradford | 19 | 6 | - | 5 | - | 8 | 24 | 24 | 0 | 23 |
| 16 Chesterfield | 19 | 6 | - | 5 | - | 8 | 26 | 27 | -1 | 23 |
| 17 Port Vale | 19 | 7 | - | 2 | - | 10 | 22 | 28 | -6 | 23 |
| 18 Northampton | 18 | 5 | - | 7 | - | 6 | 15 | 18 | -3 | 22 |
| 19 Rotherham * | 20 | 9 | - | 4 | - | 7 | 32 | 26 | 6 | 21 |
| 20 Cheltenham | 19 | 6 | - | 0 | - | 13 | 16 | 28 | -12 | 18 |
| 21 Bournemouth | 19 | 3 | - | 8 | - | 8 | 17 | 26 | -9 | 17 |
| 22 Millwall | 19 | 4 | - | 5 | - | 10 | 18 | 31 | -13 | 17 |
| 23 Brentford | 19 | 3 | - | 8 | - | 8 | 16 | 31 | -15 | 17 |
| 24 Leyton Orient | 18 | 3 | - | 6 | - | 9 | 20 | 34 | -14 | 15 |

Føroyskir spælarar Claus Bech Jørgensen (Blackpool)

*) Rotherham byrjaði árið við 10 minusstigum. Hetta tí felagið er sett undir umsiting